# Karsten Hansen stillar upp aftur á næsta løgtingsvali

**– Eg havi fingið røring í og vil fegin hava at vita, hvat veljarin heldur, sigur hann**

POLITIKKUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Eg havi gjørt av, at eg stilli uppaftur á næsta løgtingsvali.

Tað ger Karsten Hansen greitt í morgun.

Stórur ivi hevur verið um hansara politisku framtíð, eftir at hann meldaði seg úr Tjóðveldisflokkinum í kjalarvørrinum á, at Løgtingið samtykti at geva samkyndum innivist í revsilógini.

Men nú ger hann í øllum førum greitt, at hann fer at stilla uppaftur.

Hann hevur annars mangan ivast í, um hann eigur at stilla upp aftur.

Men nú hann hevur hugsað seg um, heldur hann, at tað er rætt at stilla upp og tað fer hann at gera.

– Eg havi fingið røring í nøkur viðurskifti og tí haldi eg, at tað er rætt at stilla uppaftur fyri at fáa at vita, hvat veljarin heldur, sigur hann.


*– Eg veit, at hetta kann kosta mær dýrt politiskt, men tað er als ikki tað, málið snýr snýr seg um hjá mær. Tí fer hann ikki at gera eftir áheitanini um at siga tingsessin frá sær. Tvørturímóti vil hann hava veljarans dóm fyri á næsta løgtingsvali*

Men er tað nú greitt, at hann fer at stilla uppaftur, er tað framvegis ógreitt, hvønn hann fer at stilla upp fyri.

Men tann loynidómurin er hann ikki til reiðar at avdúka enn.

– Tað fari eg at boða frá á tíðindafundi ein av døgunum, sigur hann.

Hinvegin er tað í øllum førum greitt, at tað verður ikki fyri Tjóðveldisflokkin at hann stillar upp.

– Fyri at stilla upp fyri Tjóðveldisflokkin, skal eg vera limur og eg havi jú meldað meg úr flokkinum, sigur hann.

### Heldur fast um tingsessin

Men Karsten Hansen ger eisini greitt, at hann fer ikki at gera eftir áheitanini frá Norðoya Tjóðveldisfelag um at siga tingsessin frá sær.

– Nógv tey flestu, sum hava valt meg, eru ikki limir í Norðoya Tjóðveldisfelag, tí eg fekk fleiri ferðir so nógvar atkvøður, sum tað eru limir í felagnum.

*– Men tað er felagið, sum hevur stilla teg upp?*

Tað er rætt, men eg havi verið limur í Tjóðveldisflokkinum ein mansaldur og havi tænt flokkinum so væl, eg havi kunnað.

Hinvegin sær hann ikki meiningina í, at fráboðanin kemur frá Norðoya Tjóðveldisfelag um at hann hevur meldað seg úr.

– Í mínum hugaheimi meldaði eg meg úr flokkinum, og sostatt eisini úr felagnum, longu tá ið atkvøðugreiðslan um 266 b var í Løgtinginum. Tann fráboðanin var so greið, at hon skuldi ikki verið til at misskilt.

– Tá harmaðist Norðoya Tjóðveldisfelag um, at eg var farin úr, men vónaði, at eg og flokkur funnu saman aftur. Men síðani hava tjóðveldisfólk eftir øllum at døma havt torført at ásanna, at eg havi meldað meg úr, tí einar tvær ferðir havi eg lisið í bløðunum, at eg eri framvegis limur í felagnum.

– Tí havi eg nú skorið tað út í pappi, sigur Karsten Hansen.

### Kann kosta dýrt

Karsten Hansen sigur, at hann er fullgreiður yvir, at avgerðin um at taka seg úr Tjóðveldisflokkinum, kann kosta honum dýrt politiskt.

Men hjá honum er tað als ikki hetta, sum málið snýr seg.

– Hjá mær snýr málið seg eina og aleina um at halda fast við mína sannføring. Tí kundi eg ikki longur vera limur í einum flokki, sum ikki vil byggja á kristnu lívsvirðini og sum ikki heldur, at vit kunnu stíga út í heimin, fyrrenn vit hava fingið skrásett parlag og so framvegis.

– Tað er ein ærlig støða, sum eg havi fulla virðing fyri. Men eg vil bara ikki vera partur í tí

Annars havi eg ikki broytt politisku sannføring, tí eg eri framvegis loysingarmaður um ein háls, staðfestir Karsten Hansen.

*Í aðrari grein staðfestir formaður Tjóðveldisfloksins, at hann fer ikki at blanda seg upp í tína politisku framtíð, men hann skilir væl áheitanina um at tú skalt leggja frá tær?*

– Eg ivist ikki í, at hann skilir áheitanina. Norðoya Tjóðveldisfelag hevur kanska havt samband við hann áðrenn tey komu við henni, sigur Karsten Hansen.

Karsten Hansen vísur eisini aftur tí, sum Heini O Heinesen sigur aðrastaðni í blaðnum.

– Eg havði ikki viljað havt Heina úr tinginum. Annars var málið um 266 b og samkynd eisini fyri í Løgtingum, tá ið Heini O Heinesen var í Løgtinginum og tá vóru vit báðir púra samdir, sigur Karsten Hansen.

# Høgni skilir støðuna hjá Norðoya Tjóðveldisfelag

**Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum vil ikki blanda seg upp í politisku framtíðina hjá Karsten Hansen, men hann skilir áheitanina frá Norðoya Tjóðveldisfelag**

POLITIKKUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Eg blandi meg ikki upp í, men eg skilji støðuna hjá Norðoya Tjóðveldisfelag

Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, vil ikki siga um hann tekur undir við áheitanini frá Norðoya Tjóðveldisfelag í morgun á Karsten Hansen um at siga tingsessin frá sær.

– Tað er ikki eitt mál, sum flokkurin leggur seg út í, tí alt, sum hevur við uppstilling at gera, er latið upp í hendurnar á økisfeløgunum burturav.


*Høgni Hoydal blandar seg ikki upp í, men skilir støðuna hjá norðoyingum*

Sostatt er hetta eitt mál ímillum Karsten Hansen og felagið.

– Men eg skilji væl, at felagið, sum hevur gjørt eitt stórt politiskt arbeiði, og sum stilla valevni upp til valið, følir tað sum um at tað hevur mist ein tinglim.

Annars harmast formaður Tjóðveldisfloksins framvegis um, at Karsten Hansen er farin úr Tjóðveldisflokkinum og hann dylir ikki fyri, at hann framvegis vónar, at hann kemur aftur í flokkin

# Heini fúsur at taka sessin eftir Karsten

**– Hevði tað verið eg, hevði Karsten Hansen uttan iva hildið, at tað mest natúrliga var, at eg legði frá mær, sigur Heini O Heinesen**

TJÓÐVELDISFLOKKURIN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hevði Karsten Hansen sagt tingsessin frá sær, er Heini O Heinesen fúsur at fara aftur á Løgting.

Tað sigur gamli tingmaðurin úr Kunoy, sum er næsti maður á tjóðveldislistanum í Norðoyggjum.

Annars vil Heini O Heinesen ikki siga um hann heldur, at Karsten eigur at siga tingsessin frá sær, nú hann hevur meldað seg úr flokkinum.

– Men hevði tað verið øvugt, so at tað var eg, sum meldaði meg úr flokkinum, vænti eg, at Karsten Hansen hevði hildið tað verið natúrligt, at eg segði tingsessin frá mær.

Annars dylir Heini O Heinesen ikki fyri, at hann hevði ikki gjørt sum Karsten Hansen og meldað seg úr flokkinum.

– Eg veit onki um, at flokkurin hevur nakran skrásettan politikk á økinum og í hevur tað staðið til samvitskuna hjá hvørjum einstøkum, hvussu teir atkvøða.

– Eg var ikki altíð samdur við flokkin, men eg kundi ikki funnið upp á at melda meg úr flokkinum tí uttanfyri hevur ein so als onga ávirkan.

– Eg dugi ikki at síggja, at hetta málið skal vera so nógv øðrvísi enn so mong onnur mál. Tað er í nógvum málum, at tað er latið upp til sannføringina hjá hvørjum einstøkum tingmanni og eg haldi ikki at tað er rætt at melda úr flokkinum fyri tað, tí so missur ein alla ávirkan.


*– Heini O Heinesen er ikki samdur í, at tað er rætt at melda seg úr einum flokki, tá ið tað gongur ímóti. Uttanfyri hevur ein so als onga ávirkan, sigur hann*

– Tað eru altíð ymsar meiningar í einum flokki, men uttanfyri hevur ein so onga ávirkan

At Norðoya Tjóðveldisfelag síðani heitir á hann um at siga tingsessin frá sær, skilir Heini O Heinesen væl.

– Hinvegin mugu vit eisini siga, at tann, sum er valdur, hann er valdur, leggur hann afturat.

Heini O Heinesen sigur, at hann stillaði upp seinast, tí hann metir framvegis, at hann hevur nakað at geva av á politiska økinum.

Og hann hevur framvegis ikki mist hugin til politikk, so skuldi møguleikin verið har, er hann fúsur at taka av.